ítróttur

Nr. 186 • hósdagur • 27. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Kvinnurnar eiga sín rætt í Klaksvík

KÍ føroyameistari hjá kvinnum 2001. Aftan frá vinstru: Paula Mikkelsen, Paula Sjóstein, Una Olsen, Mariann Joensen, Ann Olsen, Kristina Eyðbjørnsdóttir, Petra Sjóstein, Rannvá Andreasen, Vivian Bjartalíð, Jón Harald Poulsen, venjari. Framman frá vinstru: Annelisa Justesen, Elsa Maria Simonsen, Jensa Sirdal, Bára Skaale, Johanna Niclasen, Vivi Andreasen, Anna Müller Jacobsen, Ragnhild Aas, Ragna Andreasen, Malena Josephsen og Sigrid Mikkelsen

Áhugin fyri kvinnufótbóltinum í Klaksvík er so stórur sum ongantíð, og nú er stóra gularótin hjá meistaraliðnum Europa Cup avbjóðingin í komandi viku

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Leygardagin var stórur dagur hjá fótbóltskvinnunum í Klaksvík. Í síðsta dystinum fingu tær onga mótstøðu frá HB. KÍ vann 11–1, men onkur var kanska eitt sindur kløkkur í fyrsta minuttinum. Tá fekk KÍ brotsspark, sum tær misnýttu. So fór HB í álop. Tær fingu fríspark, sum Annika Godtfred sendi beinleiðis í málið, og so var 1–0 til HB.

Men tá fimm minuttir vóru farnir, var KÍ frammanfyri 2–1. Í steðginum var 5–1, og úrslitið var 11–1.

Áskoðararnir fagnaðu meistaraliðnum, og Norðoya Sparikassi, sum er sponsor, møtti upp við kekki upp á 25 túsund krónur.

Hjá flestu spælarunum var meistaraskapurin tann triði í fimm kappingarár. Tær vunnu í 1997, í fjør og aftur í ár.

At ein stórur partur av spælarunum hevur spælt í fleiri ár og framvegis er eldhugaður og leggur nógv fyri í venjing og dystum, hevur ikki eyðkent kvinnufótbóltin í Føroyum tey seinnu árini.

Og høvdu kvinnurnar ikki tíðliga í summar sjálvar so at siga trýst tað ígjøgnum, at KÍ skuldi taka av innbjóðingini frá UEFA um at taka lut í fyrstu Europa Cup kappingini nakrantíð fyri kvinnur, so hevði kvinnufótbólturin í Klaksvík neyvan stórtrivist, sum hann hevur gjørt tað í summar. Men tað kann kortini væl hugsast, at hann hevði verið nóg væl fyri til at vera við í kappingini um meistaraskapin.

Lyklaspælararnir

Í fleiri felógum hevur í summar verið at hoyrt um nógvar útskiftingar í kvinnufótbóltinum, og í fleiri av liðunum, sum have tikið lut í bestu deildini, hava spælararnir verið heilt ungir.

Millum royndu spælararnar í Klaksvík eru nógvar, sum hava altjóða royndir. Rannvá Andreassen, Ragna Andreassen, Vivian Bjartalíð, Malena Josephsen og Bára Skaale vóru allar við á landsliðnum, sum vann gull á oyggjaleikunum. Kristina Eyðbjørnsdóttir, sum kom til KÍ í summarsteðginum, er ein av mest royndu og bestu spælarunum í Føroyum, og so hevur 27 ára gamla Ragnhild Elin Aas, sum í summar kom úr Sogndal og til Klaksvíkar, víst seg at vera góður fongur.

Men tað var um reppið, at fleiri av hesum spælarunum ikki spældu við KÍ eftir summarsteðgin. Ranga og Rannvá Andreassen umhugsaðu av álvara at fara til Noregs at royna góðu fótbóltsevnini, og tað er ivasamt, um Kristina Eyðbjørnsdóttir hevði flutt til KÍ, um talan ikki hevði verið um eina gularót uttan fyri landoddarnar.

– Europa Cup avbjóðingin er stóra avbjóðingin í hesum kappingarárinum. Spælararnir hava gingið og ganga upp í hesa uppgávuna við lív og sál. Vit skulu til Finnlands í komandi viku. Ferðin verður mett at kosta 170 túsund krónur. Í fyrstu atløgu skulu spælararnir fíggja alla upphæddina, sigur Jón Harald Poulsen. Hann hevur verið venjari øll gullárini, og síðani hann sum 16 ára gamal í 1986 fyrstu ferð tók ábyrgdina á seg at venja eitt kvinnulið, hevur hann í nógvu av árunum staðið á odda fyri kvinnuliðnum.

At vera venjari hjá KÍ kvinnuliðnum, sum skal luttaka í Europa Cup, er meiri enn bara at venja:

– Vit hava valt at venja tríggjar ferðir um vikuna. Spælaratalið liggur um tjúgu, og tær møta allar upp hvørja einastu ferð. Síðani summarsteðgin hava spælararnir eisini verið upptiknir av inntøkuskapandi tiltøkum, og eg royni at hjálpa teimum eitt sindur. Vit vóna, at FSF fer at spýta í, og at felagið fer at rinda nakað. Tær 25 túsund frá sparikassanum komu væl við, men annars hevur talan verið um tiltøk av ymiskum slagi.

Avbjóðingin

Sunnudagin fer fyrsta kvinnu ferðalagið úr Føroyum at taka lut í Europa Cup fótbólti. Nítjan spælarar vera í við í ferðini. Og annars fer ferðalagið at líkjast nógv teimum, sum plaga at fara av landinum í Europa Cup ørindum. Tveir KÍ nevndarlimir vera ferðaleiðarar. Thom Jakobsen skal taka sær av klæðunum, Margit Joensen verður liðleiðari, Magnus Magnussen verður læknin á ferðini, og Helga Mikkelsen, sum er undir útbúgving til fysioterapeut, verður eisini við.

KÍ ferðalagið steðgar á í Keypmannahavn. Akkurát sum menninir hjá KÍ plaga at gera, so fer kvinnuliðið til Haslev, har ein lítil venjingarlega verður. Týsdagin verður farið til Helsingfors í Finnlandi, og so verða dystir á skránni mikudagin, fríggjadagin og sunnudagin. Fyrsti dysturin verður ímóti Landhaus úr Eysturrík, næsti dysturin verður ímóti heimaliðnum, Helsinki, og síðsti dysturin verður ímóti Torres úr Italia.

– Vit hava roynt at kunna okkum um mótstøðuliðini, men tað hevur ikki gingið serliga væl. Okkara fatan er, at italska liðið er tað besta, og at eysturríska liðið er tað veikasta. Hetta er fyrsta ferðin, at vit eru við, so vit kunnu siga, at vit eru við fyri at læra. Men vit fara at gera okkara besta, sigur Jón Harald Poulsen.

Virðingin

Tá vit spyrja Jón Harald, um hann heldur, at tað bara er gularótin í Europa Cup, sum er orsøkin til, at kvinnufótbólturin í Klaksvík tykist hava størri áhuga, enn áhugin sigst vera aðra staðni í landinum, so heldur Jón Harald, at tað eisini kann vísast á aðrar orsøkir.

– Vit hoyra ofta søguna um, at Fótbóltssambandið skal gera meiri fyri kvinnufótbóltin, men eg haldi ikki, at tað er har, at fyrstu stigini skulu takast. Her norðuri hjá okkum hava vit í fleiri ár stríðst fyri at fáa somu sømdir og karmar, sum menninir hava. Tað hevur givið úrslit, og nú haldi eg, at felagið og onnur, sum hava við kvinnufótbóltin at gera, vísa størri fatan og áhuga, enn tað varð gjørt fyri fáum árum síðani.

Hvussu sæst hetta aftur?

– Tá kvinnurnar møta til venjingar, skulu tær bara hava fótbóltsskógvarnar og beinskinnararnar við. Øllum hinum verður syrgt fyri í felagnum. Kvinnurnar hava hvør sítt skáp, vit hava okkara egnu bóltar og vestar, og soleiðis kundi eg hildið á. Ofta hoyrist um, at útgerðin, sum kvinnufótbólturin fær, er ikki á hædd við tað, sum verður veitt monnunum, og at kvinnurnar fáa sera ólagaligar venjingartíðir. Soleiðis er tað ikki hjá okkum, og tað hevur eisini týdning. Kvinnurnar venja týsdag, hósdag og fríggjadag klokkan 18.30 ella somu tíðir, sum tá menninir venja. Um teir hava brúk fyri øllum vøllinum, so finna vit eina loysn. Men – sum sagt – so hevur tað alstóran týdning, at kvinnurnar kenna, at tað verður roknað við teimum, og at tær kenna seg viðurkendar, sigur Jón Harald Poulsen, sum saman við KÍ fótbóltskvinnunum sær við stórum spenningi fram ímóti avgerandi royndini í hesum kappingarárinum. Tær hava vunnið FM, og nú snýr tað seg um Europa Cup í Finnlandi í komandi viku.

Ítróttarsosialurin ynskir KÍ hjartaliga tillukku við FM heitinum. Teimum verður eisini ynskt eina góða ferð til Finnlands.

Daewoo Open á Kambsdali

ÍF fer nú at skipa fyri nýggjari badmintonkapping í ítróttarhøllini á Kambsdali. Kappingin kallast Daewoo Open og verður fyrstu ferð í døgunum 13. og 14. oktober.

Kappast verður í U11, U13 og U15 fyri gentur og dreingir, og vónin er, at hendan kappingin verður afturvendandi.

Badmintonsamband Føroya hevur skaffað føroysku feløgunum útlendskan venjara, og tað verður gjørt í eini roynd at hækka støðið í Føroyum.

– Vit vilja eisini vera við til at søkja um áhugan fyri badminton, og til at hjálpa okkum hava vit fingið Daewoo sum sponsor, sigur ÍF í tíðindaskrivi.

ÍF heitir á allar badmintonspælarar um at vera við í Daweoo Open, fyri at kappingin kann gerast so góð og fjølbroytt sum gjørligt.

Ætlanin er at leggja kappingina soleiðis til rættis, at øll fáa nógvar dystir, og vinnarin fær steyp.

Hava savnað 170 túsund

KÍ-liðskiparin Ragna Andreasen, fær steypið handað frá Kristiannu Høgnesen

Stóri lokali áhugin fyri KÍ kvinnuliðnum ger, at spælararnir ikki hava kent tað stríggið at brúka hvørja fríløtu at fyrireika Europa Cup ferðina

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tá tað í apríl gjørdist greitt, at KÍ kvinnurnar høvdu møguleikan at taka lut í Europa Cup, var gjørt av, at kvinnurnar skuldu sjálvar syrgja fyri fíggingini.

– Vit fingu at vita, at vit skuldu fáa 200 túsund til vega. Tá kendist hetta sum eitt stórt tak. Nú hava vit savnað 170 túsund krónur.Vit hava brúkt so at siga hvørt vikuskifti og nógv gerandiskvøld. Men tá vit hyggja aftur á hetta, so kennist tað ikki tungt, men heldur hugaligt, tí undirtøkan hevur verið so góð.

Hetta sigur Malena Josephsen. Hon er ein av royndu KÍ spælarunum. At tær eru fleiri, sum hava stóran áhuga fyri fótbóltinum sæst aftur á so mangan hátt. Eitt nú hevur Malena sína egnu heimasíðu um KÍ og tvíburðarnir Ragna og Rannvá Andreassen hava eisini eina heimasíðu.

Stuðulin

Tá vit spyrja Malenu Josephsen, hvussu tað hevur eydnast at fáa savna so nógvar pengar, hevur hon beinanvegin nógv av høvuðstølunum klár:

– Vit vóru sera fegnar um, at Norðoya Sparikassi leygardagin, tá vit fingu FM steypið og gullkrónurnar, handaði okkum 25 túsund. Lutaseðlasølan og stuðulsrenningin góvu 30 túsund í part, tiltakið við All That Rain gav 25 túsund, og so fingu vit 14 túsund burturúr, tá nýggi vøllurin varð tikin í brúk. Vit halda, at júst hetta síðsta vísti sera væl, hvussu væl klaksvíkingar og norðoyingar taka undir við okkum. Tað kostaði einki at vera við, men tað var møguleiki at stuðla Europa Cup tiltakinum hjá okkum, og so fingu vit 14 túsund. Tað var flott.

Aðrar inntøkur eru t. d. komnar frá køkutombolum og kaffisølu í sambandi við heimadystir.

– Vit ynskja sjálvandi 1. deild hjá monnunum alt tað besta. Men tað kemst ikki uttanum, at áhugin fyri okkara fótbóltsspæli og harvið eisini áhugin fyri at stuðla okkum á annan hátt økist, tá tað ikki hilnast so væl hjá monnunum, heldur Malena Josephsen.

Umstøðurnar

Malena Josephsen heldur, at umstøðurnar, sum kvinnufótbólturin hevur í Klaksvík, nú gera tað hugaligt at vera við:

– Tað er altíð okkurt, sum kundi havt verið betri. Vit hava grenjað, men vit hava eisini gjørt nakað við tað sjálvar. Í Klaksvík eru umstøðurnar øðrvísi, enn tær kanska eru nógvar aðra staðni. Kappingin er ikki so stór. Tá vit skipa fyri tiltøkum, og tá dystir eru, so møta nógv upp.

Venjarin sigur, at tað sæst aftur í áhuganum at spæla?

– Heilt víst. Nú eru vit einar 20, sum kappast um plássini á besta liðnum. Eg tori at siga, at allar høvdu sloppið upp í part á øllum hinum liðunum í landinum.

Men tit taptu steypafinaluna?

– Tað kunnu vit bara takka okkum sjálvum fyri. Vit spældu ikki upp til okkara besta. Helga Ellingsgaard var framúr hjá HB, og so misnýttu vit eina rúgvu av uppløgdum málmøguleikum. Men tað hava vit lagt afturum okkum. Vit fegnast um FM heitið, vit gleða okkum til Europa Cup, og vit vilja hjartaliga takka klaksvíkingum og norðoyingum fyri, at tey hava tikið so dyggiliga undir við okkum, heilsar Malena Josephsen fyri KÍ kvinnurnar.

Norski spælarin hjá KÍ, Ragnhild Aas, stríðist við HB-spælarar. Ragnhild gjørdi seks mál í seinasta dystinum

Allan Mørkøre gav avboð

Í blaðnum í gjár søgdu vit, at nú var Allan Mørkøre aftur úti í kuldanum. Tað gjørdu vit, tí veteranurin ikki er millum teir átjan, sum í komandi viku skulu til Slovenia.

Men her hava vit misskilt. Sambært Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjara hjá Allani Simonsen, so varð Allan Mørkøre ikki upp á tal hesa ferð. Tað var hann ikki, tí Allan Mørkøre eftir dystin ímóti Russlandi boðaði frá, at hann orsaka av skúlanum ikki fór at hava stundir at fara niður til Slovenia.

Vit biðja Jógvan Martin Olsen, Allan Mørkøre og lesararnar halda okkum til góða.

Og so vóru onkrar aðrar villur eisini í landsliðssøguni í gjár.Gløggi lesarin fann ivaleyst út av, at HB ikki eigur ein men tveir spælarar í landsliðshópinum – Rógva Jacobsen og Jón Róa Jacobsen. Og tá Jógvan Martin Olsen nevndi spælarar, sum teir saknaðu, so gloymdu vit tvey nøvn, sum hann nevndi – Una Arge og Sámal Joensen. Orsaka okkum eina ferð enn!

blm

Bronsan hongur framvegis

Útsetti dysturin millum B71 og HB fer at gera av, um VB ella HB skal vinna bronsumerkini hjá kvinnunum

KÍ er FM vinnari í kvinnufótbólti, og B36 hevur vunnið silvur merkini.Men tað er framvegis ikki greitt, um tað verður HB ella VB, sum fer at vinna bronsuna.

Mikudagin í síðstu viku var VB á Sandi og spældi dystin, sum sambært skránni skuldi havt verið avgreiddur 12. august. VB vann 4–1. Harvið eru vágs kvinnur tvey stig aftanfyri HB, sum er nummar trý.

Tveir dystir eru ikki spældir. Annar er tann hjá B71 og HB, sum skuldi havt verið spældur á Sandi 30. juni, og hin er tann millum VB og HB, sum í síðsta umfarinum, 22. september, skuldi havt verið spældur í Vági.

Kvinnukappingin hevur verið órógvað av, at tað hjá summum felógum hevur verið torført at manna lið. Vit hava skilt, at nú er ætlanin, at dysturin á Sandi millum B71 og HB skal fáast frá hondini. Um VB eftir tann dystin framvegis fer at hava møguleikan at røkka bronsumerkjunum, so skal B71 eisini suður til Vágs. jh

Endaspælið – 1. deild kvinnur

	dystir	vunnið	javnt	tap	mál	stig
KÍ	10	9	0	1	57–10	27
B36	10	6	0	4	13– 8	18
HB	9	4	1	4	24–30	13
B68	10	4	1	5	18–18	13
VB	9	3	2	4	13–15	11
B71	8	0	0	8	4–48	0

Máltindurin í endaspælinum

Kristina Eyðbjørnsdóttir,	KÍ	14
Vivian Bjartalíð,	KÍ	12
Ragnhild Aas,	KÍ	12
Malena Josephsen,	KÍ	10
Guðrið úr Lágabø,	VB	6
Maibritt Olsen,	KÍ	5
Irdi Hansen,	B68	5
Súsanna Hansen,	B36	5
Lydia Vesturtún,	HB	5
Bára Skaale,	KÍ	3